UTTAN ÚR HEIMI

## Segði seg hava mist dóttur í flóðalduni

Í juli í fjør boðaði bretin Philip Bosson bretsku løgregluni frá, at hann hevði funnið líkið av dóttur síni í einum líkhúsi í Sri Lanka, har myndugleikarnir høvdu savnað fólk, sum vóru druknað í teiri stóru flóðalduni.

Sambært BBC ivaðist løgreglan ikki í, at tann 19 ára gamla Kayleigh Bosson var deyð í flóðalduni, men løgreglumenninir fóru at ivast, tá teir varnaðust, at pápin hevði ilt við at stava navnið á dóttur síni. Tí bleiv avgjørt at biðja Interpol kanna málið. Tríggjar mánaðir seinni varð staðfest, at Philip Bosson hevði ongantíð átt eina dóttur. Nú er Philip dømdur tríggjar mánaðar fongsul fyri at hava órógvað arbeiðið hjuá løgregluni.

Ein fyrrverandi unnusta hansara hevur greitt løgregluni frá, at Philip hevur altíð verið hugtikin av navninum Kayleigh, sum hann hevði funnið í einum sangi frá áttatiárunum, sigur BBC.

## Søguligt val

Hóast landið eitur Demokratiska Lýðveldið Kongo, hava viðurskiftini har ikki havt serliga nógv við demokrati at gera. Í 1870 kom landið undir belgiskt ræði, og belgiumenn stýrdu tí við harðari hond, til tað fekk sjálvsstýri í 1960. Men longu fimm ár seinni tók herovastin Mobuto Sese Seku valdið sum einaræðisharri, og tað hevði hann líka til 1997, tá Laurent Kabila tók við. Seinastu árini hevur sonur hansara, Joseph Kabila, sitið við valdið.

Í gjár varð fráboðað, at 80 prosent av fólkinum hava tikið undir við, at veljararnir skulu velja tjóðarting og forseta, og ætlandi verður hendan stórhendingin eina ferð í mars, skrivar AP úr Kinshasa.

Val hevur ikki verið í Demokratiska Lýðveldinum Kongo seinastu 35 árini. Ta ferðina skuldu fólk velja forseta, men í veruleikanum var hetta ikki eitt val, tí Mobuto Sese Seku var einasta valevni.

## Leyvur leypa á fólk



Myndugleikarnir í Tanzania og har norðuri í Mosambik kæra seg um, at tað gerst alt meiri vanligt, at leyvur leypa á fólk. Tað eru umleið 5.500 leyvur í teimum báðum londunum, og tey seinastu árini hava tær lopið á fleiri hundrað fólk. Tað ger, at fólk eru ræðsluslígin, bara ein leyva er í nánd, skrivar Reuters.

Í nítiárunum var vanligt, at leyvur lupu á umleið 40 fólk um árið, men tey seinastu árini hava álopini verið umleið 100 um árið. Serfrøðingar siga, at leyvurnar eru vorðnar munandi djarvari, og at tær gera sær dælt av, at nógvir bøndur eru úti um náttina fyri at ansa eftir húsdjórunum.

– Umleið 70 prosent av teimum, sum verða álopin, doyggja, sigur amerikanski granskarin Craig Packer, sum stendur á odda fyri einari verkætlan í einari villdjóralund har norðuri í Tanzania. Hann sigur, at tað hendir javnan, at leyvur bróta seg inn á fólk og draga tey út úr húsunum, áðrenn tær gera av við tey.

## Giftast á flogvøllinum

Altsamt fleiri svensk ungfólk velja at giftast í altjóða floghavnini í Stockholm, Arlanda Airport, skrivar TT.

Í 2004 vórðu umleið 400 pør vígd í floghavnini, og í fjør var talið næstan 500. Helena Miller, talskvinna hjá floghavnini, sigur, at tað er eitt gott hugskot at giftast í Arlanda, um fólk ætla sær á brúdleypsferð beint eftir vígsluna. Hon leggur afturat, at í floghavnini royna tey at skipa so fyri, at fólk verða vígd, beint áðrenn flogfarið, sum tey skulu við, fer avstað.

Helena Miller sigur, at tey flestu pørini velja at lata starvsfólkini hjá floghavnini taka sær av viðførinum, ferðaseðlunum og ferðaskjølunum, meðan vígslan fer fram, so tað er púra klárt hjá teimum nýgiftu at fara á brúdleypsferðina.

# Ali Agca latin leysur

**Mehmet Ali Agca, sum royndi at beina fyri Jóihannesi Páll páva, er nú sloppin úr fongslinum**




*Mehmet Ali Agca var umgirdur av løgreglumonnum, tá hann slap út úr fongslinum*

*Mynd: Reuter*

MORÐROYND

*Árni Joensen: fartekst@mail.fo*

Í 1981 royndi tann 23 ára gamli turkiski maðurin Mehmet Ali Agca at beina fyri táverandi pávanum, Jóhannrsi páll Øðrum, á Pæturstorginum í Rom. Men morðroyndin miseydnaðist, hóast pávin var illa særdur av skotunum. Stutt eftur var Ali Agca dømdur og settur í fongsul.

Tá hann hevði sitið í 19 ár, gjørdu italsku myndugleikarnir av at veita honum grið og at senda hann aftur til Turkalands. Har kom hann aftur í fongsul, tí hann viðgekk at hava verið uppi í einum bankaráni og einum morði í sjeytiárunum. Í morgun slapp hann so út eftir næstan 25 ár aftan fyri rimarnar.

Jóhannes Páll pávi var í 1983 í fongslinum og vitjaði mannin, sum royndi at myrða seg. Pávin fyrigav honum gerðina og vælsignaði hann.

Tað er framvegis ein gáta, hví Mehmet Ali Agca royndi at beina fyri pávanum. Tey flestu hildu hann vera sinnissjúkan, men onnur halda, at hann var ikki einsamallur um morðætlanina. Eitt nú halda summi, at fregnartænasturnar Bulgaria og Sovjetsamveldinum stu8ðlaðu morðrouýndini, men tað er ongantíð prógvað.

# Ætlaðu at seta hermenn umborð á russiskan trolara

**Norðmenn ætlaðu at seta servandar hermenn umborð á russiska trolaran „Elektron", sum rýmdi undan norsku sjóverjuni í oktober. Men trolarin var ov langt úr landi**

SJÓVERJA

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

„Elektron" rýmdi undan norsku sjóverjuskipunum við tveimum norskum eftirlitsmonnum, sum vóru farnir umborð á trolaran at kanna veiði og reiðskap. Hóast áhaldandi áheitanir um at steðga valdi russiski skiparin at sigla í russiskan sjógv við teimum báðum eftirlitsmonnunum.

Nú hava dulnevndar keldur avdúkað, at norska sjóverjan hevði savnað eitt lið av servandum hermonnum, og at ætlanin var, at ein tyrla skuldi seta teir umborð á tann russiska trolaran. Men tað vísti seg, at „Elektron" var so langt úr landi, at brennievnið hjá tyrluni fór ikki at røkka til ta longu ferðina.

Løgregluovastin í Troms, Truels Fyhn, sigur við blaðið VG, at hann fekk boðini um, at servandir hermenn vóru farnir av einari støð, men at teir høvdu vent aftur. Verjumálaráðið í Oslo vil hvørki vátta ella avsanna tíðindini.